# Norðurlendsk eleganse – í bóndans húsi

Tá tú skalt vitja í bóndans húsi, hevur tú kanska longu í hugaheimi tínum hugsað, at bóndans hús er heldur grovligt í tí. Um so er, so verður tú stórliga bilsin, tá tú koyrir eftir Gerðisbreyt á Velbastað og kemur fram á heimið hjá Annu og Óla Rubeksen. Her ræður javnvág, friður og reinur estetikkur.

Friðurin fellur á teg, longu tá tú trínur innar. Her eru tað ikki einans heimið sjálvt og innbúgvið, sum geva tær hesa kenslu, men eisini fólkini og djórini, sum her búgva.

Anna og Óli búgva her saman við soninum, Eliesari, sum er 24 ára gamal. Eisini eru tey foreldur at gentunum Noru Mariu, Ragnhild og Bjarmu, sum allar eru fluttar heimanífrá. Hóast tey eru bøndur, so hava tey bæði síni dreymastørv til dagligt. Anna starvast sum sjúkrarøktarfrøðingur og arbeiðir við fólki við demensi. Óli er SSP-ráðgevi. Og so bjóða tey inn til heimablídni. Har tú sleppur innat at uppliva matin, sum tey framleiða á garðinum, og ikki minst serliga huglagið í heimi teirra við einastandandi útsýninum yvir á smáu oyggjarnar Hest og Koltur.

Elskuligu ketturnar, Marius og Ruth, eru eisini partur av fjálga huglagnum, sum valdar innandura. Við einum lítlum skálkasmíli heldur Anna fyri, at tær eita eftir foreldrunum hjá Óla. Tær tita aftur og fram í heiminum og sleingja seg dovisliga á fjálgu seyðaskinnini. Teir tríggir hundarnir, Fram, Lóa og Brim, eru vanir við nógv fólk og skikka sær væl millum mongu gestirnar, sum koma inn á gólvið.

EFTIR: **ANNLEYG LAMHAUGE**, MYNDIR: **AMY HANSEN / AMY & EDNA**



1



2

1. Veðraskølturin bjóðar tær vælkomnum til Annu og Óla. 2. Grønar plantur, ráir pottar og hugnaligir møblar fríðka um í spísistovuni.





Sunnari partur av spísistovuni við ráa bóndaborðinum og yndiskrókinum hjá Annu.



1



2



3

1. Estetiski samrøðukøkurin, har fólk samlast runt um bóndahjúnini, tá tey borðreiða. Søgur verða sagdar um matin og um hvalvápnið, sum hongur á vegginum. Samstundis sum fínligu, ikonisku Caravaggio lampurnar draga elegansuna enn meiri fram. 2. Eingilin, sum hongur í vindeyganum, er eitt minni frá Eliesari, sum gjørdi hann í skúlanum, tá hann gekk í fyrsta flokki.. 3.Húsfólkið í køkinum.

# Bóndahúsini til framtíðina

Anna og Óli fluttu inn í húsini á heysti í 2006 og hava sostatt búð í teimum í góð 11 ár.

– Stóri spurningurin, vit fingu frá Heidi Poulsen, arkitekti, var, um vit vildu byggja í gamlan stíl, ella um vit vildu byggja til framtíðina. Eftir at hava grundað væl um hendan spurning komu vit til, at vit vildu hava eini bóndahús til framtíðina, sigur Anna.

Húsið stendur væl í brattlendinum á Velbastað, har arkitekturin smidliga hevur lagt tey inn í landslagið. Samstundis hevur hon havt í huga, hvussu sólin ferðast úr einum enda av húsinum til hin gjøgnum dagin.

– Soleiðis hava vit sólina allan dagin, heldur Anna fyri. Eina Morgunterassu sunnan fyri húsini, har eg seti meg útum við einum kaffikoppi um morgunin. Síðani hava vit kvøldarterassuna norðan fyri húsini, har vit finna uppá at tendra hitapottin ella grillina um kvøldarnar.

– At hetta eisini er bóndahús, er eyðsæð við stóra bóndaborðinum í spísistovuni, heldur Anna fram. Har hevur mong fjallmanning fingið ein góðan bita eitt heystarkvøld eftir ein strævnan dag í fjøllunum.

Tey vóru í sama lagi tilvitað um, at hetta vóru teirra 'seinastu' hús. Her skulu tey búgva, til tey kanska einaferð flyta á ellisheim. Soleiðis er innrættingin av húsinum sera praktisk og einføld.









Design to Shape Light

Cirque - Design: Clara von Zweigbergk
PH 5 - Design: Poul Henningsen
Panthella MINI - Design: Verner Panton

louis poulsen

IDEmøblar

louispoulsen.com





1. Úr køkinum verður hugt inn í stovuna og víðari inn í sjónvarpsstovuna.
2. Hugnaligu figurarnir av gomlu monnunum á kommoduni er arvur frá papa Óla, sum keypti hesar uttanlands.

# Minnislutir & minnismatur

At liva við, at liva í og at liva av okkara náttúru eins og teimum siðvenjum, sum vit nú einaferð hava og hava havt, tykist at vera eitt av lyklaorðunum hjá hjúnunum báðum. Tað er onki minni enn ein framúrskarandi, estetisk uppliving at sita heima hjá Onnu og Óla við eini heimabakaðari, ristaðari rugbreyðsflís við smøri og Onnusa kjøtpylsu úr egnum lambskjøti, sum hon hevur gjørt eftir gomlu uppskriftini hjá ommuni.

Soleiðis verður tað gamla sett inn í ein heilt nýggjan, einfaldan og reinan samanhang. Týðiliga andstøðan styrkir onkursvegna upplivingina, so hon stendur enn klárari fyri tær.

Minnislutir og minnismatur eru soleiðis eisini lyklaorð hjá hjúnunum. Minnislutir, har hvalvápn hanga til prýðis yvir stóru gluggunum. Minnismatur, har blóðpylsa verður borðreidd fyri gestum uttan úr heimi.





# Heimablídni

Longu tá húsini vóru á tekniborðinum vistu Anna og Óli, at tey vildu lata heimið upp fyri gestum. – Fólk undra seg ofta yvir, at okkum dámar at fáa fremmandafólk á vitjan. Tey síggja jú allar okkara privatu lutir. Alt, sum stendur á hillunum bæði í stovuni, men eisini inni á vesinum, flennir hon. Tað hava vit vant okkum við.

– Soleiðis valdu vit at hava tveir køkar. Ein stóran grovkøk, har vit gera tað mesta av matinum til. Og so ein minni køk, sum, tá vit hava gestir, mest verður brúktur at gera klárt í. Hurðin kann so fara aftur innar í grovkøkin, so vit kunnu larma við matgerðini har, hóast vit hava gestir.







1. Í grovkøkinum verður nógvur matur gjørdur til mongu borðhaldini í húsinum, og har skulu nógvar grýtur til. 2. Anna og Óli hava fingið sítt egna búmerki, sum m.a. stendur á fyrikløðunum, sum tey nýta, tá tey hava gestir. 3: Skerpikjøtið hongur klárt, so tað er lætt at fáa sær ein góðan bita í døgurðasteðginum.





1. Djúpi havblái liturin í gongini er eins og tikin úr náttúruni. 2. Vakri bláí liturin á vegginum gongur aftur í flísunum á gólvinum í gongini. 3. Á hillunum sæst, at her búgva fólk. Borðspølini standa frammi á hillunum, so tey síggjast. Eisini soleiðis at húsfólkini minnast til tey og tað virðið, sum tað er at samlast kring tey. Svarti bóndabonkurin bjóðar inn til eitt gott prát, meðan lissurnar á skónum verða bundnar.



# Rá náttúra

– Rátt náttúrutilfar dámar mær sera væl, sigur Anna. Hetta speglast aftur runt í heiminum, serliga við stóra, ráa bóndaborðinum, sum fyllir spísistovuna, eins og við øðrum innbúgvi.

Litirnir í heiminum bera boð um, at vit eru mitt úti í náttúruni. Úti í gongini er liturin á vegginum vakurt bláur, eins og hann er funnin í havinum. Og køkurin hevur fingið ein meiri mjúkan, heitan grønligan lit, kanska úr grasinum uttanfyri.

– Tað er ikki tilvitað, at hetta eru litir, sum vit hava funnið uttanfyri í okkara náttúru nærhendis, heldur Anna, men teir hóska sera væl til ráa yvirbráið, sum vit ynskja til heimið.








1



2



3

1. Útsýnið úr sjónvarpsstovuni út í stovuna og køkin. Myrkabláa stóra træreolin, hava Anna og Óli sjálv teknað og Havnar Træsmiðja hevur smíðað. Tað sermerkta við hesi reol er, at sjónvarpið er so væl innrammað í henni, at tú ikki leggur merki til tað. 2. Útsýnið úr vindeyganum í sjónvarpsstovuni við Koltri fyri framman. Neyvan verður nógv hugt í sjónvarp við slíkum útsýni. 3. Mýrisnípan, sum hongur yvir sofuni í sjónvarpsstovuni, varð fangað á baðiverilsinum hjá mammu Annu. Mamma hennara ringdi eftir Óla, tí hon helt, hon hevði eina rottu í køkinum. So var ikki.

# Um heimablídni hjá Onnu og Óla:

Anna og Óli borðreiða við 5 rættum, sum í stóran mun eru framleiddir úr rávøru av garðinum. Grønmetið kemur mestsum alt úr Veltuni á Sandoynni. Ølið kemur frá bryggjarínum Okkara, sum liggur tvær gøtur longur uppi í bygdini. Og um gestirnir kundu hugsað sær eitthvørt undirhald, so er nógv at velja ímillum á Velbastað. Har eru bæði heimsstjørnur, harmonikumenn og lokal kór millum orkufyltu grannarnar.

Góðskan og burðardygdin hava ført til, at tey hava fingið umrøðu í nógvum altjóða miðlum og eru heiðrað fyri teirra burðardygd í Norðurlanda- og ST samanhangi.






BÝLIÐ

## KVINNA spyr Annu

### Hvar fært tú íblástur?

– Vit keypa nógv býlisbløð úr Bretlandi. Country Homes, Country Lifestyle og House&Gardens. Vit eru felags um innrættingina, og fyri tað mesta eru vit grundleggjandi samd um, hvussu og hvat vit skulu gera. Tá vit eru ósamd, er tað oftast um litvalið, men tað hevur lítið og onki upp á seg.

### Títt yndisstað?

– Mítt yndisstað er í sunnara horninum í spísistovuni, greiðir Anna frá. Har havi eg alt tað vakra útsýnið, og eg havi allan seyðin beint uttan fyri vindeygað. Eisini er tað her, at mær dámar so væl at standa og strúka. Tað er rein sálarbót at standa her við undurfagra útsýninum og strúka.

### Hvør er tín næsta verkætlan?

– Her eru nógv fólk og nógv djór inni, tí sæst slit á innbúgvinum. Tað er ein ávís sjarma, at tað sæst, at húsið verður brúkt. Men viðhvørt er tað ov nógv, heldur Anna. Millum annað skal sofan í sjónvarpsstovuni skiftast út. Og eisini skal reolin við sjónvarpinum frískast upp.

### Hevur tú eitt gott prei?

– Eg eri so takksom fyri, at vit hugsaðu um sólina, tá vit bygdu húsini. At vit hava morgunterassu, kvøldarterassu og krókar, har vit finna lívd. Við okkara veðurlagi hevur tað so sera stóran týdning at finna hesar krókarnar runt húsini, ella um tú skalt byggja, hugsa teir inn í lendið og tekningina heilt frá byrjan, heldur Anna.















1. Sovikamarið hjá Annu og Óla liggur í norðara enda av húsinum, har tey vakna hvønn morgun við góða útsýninum yvir Koltur. 2. Hóast bryggjaríið Okkara liggur í bygdini, so hevur Føroya Bjór-bilurin fingið pláss á hillunum í kamarinum hjá Eliesari. 3. Óli hevur gjørt skrivaraborðið í kamarinum hjá Eliesari, sum hvílír á stórum, gomlum hátalarum. Eitt gott prei, um tú vilt fjala stórar hátalarar. Songin hvílir á kommodum, har ein ráur stállisti er lagdur millum kommodurnar og madrassuna. 4. Ljósið floymir inn gjøgnum træpersiennurnar á vesinum. Træpersiennur eru at finna í flestu rúmum í húsinum. Organiski formurin á vaskinum saman við eleganta krananum undirstrika aftur estetiska yvirbráið í heiminum.






borgaragluggin.fo - altíð til taks

TAKS